

*Bretski alternativi rockbólkurin, Radiohead, framførir her á fyrru av tveimum útseldu konsertum í the Bank of America Pavilion í Bostn fyrr í summar. Seinasta útgávan "In Rainbows" var leysgivin online mikudagin 10. oktober. (AP Photo/Robert E. Klein)*






## Ummæli:

Radiohead – »In Rainbows«. Heinta hana niður av HYPERLINK "http://www.inrainbows.com" www.inrainbows.com fyri so nógv, ella lítið, sum tær lystir!

## »OK download«

Formurin er í síni heild í ov stóran mun tann sami, sum mann hevur hoyrt fyrr frá sama bólki – tí er »In rainbows« ikki meiri enn góð. Sangurin hjá Thom Yorke dregur líka nógvar lurtarar til sín, sum hann styggir burtur. Radiohead halda fast við ta dapru og mótleysu ljóðmyndina. Hetta umfatar so sanniliga eisini tað tekstliga – hetta kann ein fáa nokk av, serlig jú oftari ein hoyrir tað, og so kanska eisini jú nærri ein sjálvur nærkast teimum 30 árunum. Men pettir í útgávuni eru væl eydnaði og sita væl, t.d. filurnar 5., 6. og 7. Øll trý løgini hava ein syrgiligan og mótleysan dám yvir sær. T.d. teksturin í nr. 5, »All I need«: »I'm just an insect/ trying to get out of the night/ I only stick with you/ because there are no others« Serliga 7. lag, »The Reckoner« kemur væl inn. Hetta er ein dramatiskt lag, ið verður skapt av trummum og slagverk, og so sanginum hjá Yorke. Lagið minnir í stóran mun um »OK Computer«, serliga »Paranoid Android«. Her er tað, at yvirritaði kemur í iva um formurin er nóg áhugaverdur at halda, tí ov ofta ljóðar tað sum endurtøkur av onkrum øðrum áður so kendum. Kanska tekstirnir, sum eg ikki havi hugt so nær eftir, bjargar tí heila – um ikki, ja so er vandi fyri, at hon gerst til enn eina útvarping av eymkan og grenji, men hóast alt í einum OK formi.

Yvirhøvur hava løgini ein meiri ítøkiligan form enn t.d. á »Hail to the Thief« frá 2003. Her eru fleiri beinar linjur og meiri vanligt. Útsetingarnar eru vakrar og settar stórt upp í støðum. Ljóðmyndirnar peika ofta aftur á »OK Computer«, t.d. MP3 fíla nr. 7, nr. 9 og lutvíst nr. 4.

Fíla nr. 6, lagið »Faust ARP«, er í grundini næstan líka akkustisk sum »Here comes the Sun« hjá George Harrison sála ella »Blackbird« hjá Lennon/McCartney, við obligatoriskum strúkarum – avgjørt eitt vakurt lag. Sungið verður eisini um »Blackbird pie«, sum sangarin hevur fingið nokk av. Møguliga er tað tónleikaídnaðurin, sum Thom Yorke her sipar til, tí hann hevur nevniliga fingið meiri ella minni nokk av honum. Hetta hevur ofta verið ført fram í miðlunm og sást eisini meiri enn einaferð í konsertfilminum »Meeting people is easy«. Samanumtikið manglar okkurt í løgunum. Og so kann tað sigast, at Radiohead aftur eru komnir nærri miðstimanum av rock/popp, og fleiri lurtarar hava bíðað eftir teimum.